# Jólabókin komin

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur nú givið út bókina Mín Jólabók 2002**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*



*Nú hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags givið 52. jólabókina út*

Hetta er bók nummar 52 í røðini av jólabókunum. Mín jólabók kom út á fyrsta sinni í 1950, og hon er síðani komin út á hvørjum ári uttan í 1958.

Tað er Tanya Joensen, sum hevur myndprýtt bókina.

Í jólabókini eru bæði nýskrivaðar og týddar søgur. »Sherlock Holmes klubbin fær vitjan úr Danmørk«, »Summarið hjá Sáru og Sannu«, »Prinsurin og krokodillan« og aðrar søgur kunnu nevnast sum nakrar av søgunum. Rithøvundar, sum nevnast kunnu eru Lydia Didriksen, Kristina Djurhuus, Maud Heinesen, Kjartan Stakksund og mong onnur.

Eisini eru fleiri yrkingar við í bókini sum vant. Tvey ævintýr eru eisini partur av bókini, og tey eru týdd.

Mín jólabók 2002 er 123 blaðsíður, heft og kostar 70 krónur í bókabúðunum. Hon er umbrotin, prentað og heft á Pf. Einars Prent.

# Yrkingasavn útgivið

**Fløktir føtur eru heitið á nýggjum yrkingasavni, sum Jónley á Løgmansbø hevur skrivað**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*



*Jónley á Løgmansbø hevur útgivið yrkingasavnið Fløktir føtur*

Annað yrkingasavnið hjá Jónley á Løgmansbø er nú komið í handlarnar. Tað ber heitið Fløktir føtur.

Jónley, ið lesur til lærara, gav fyri trimum árum síðani út fyrsta yrkingarsavn sítt »Á dreymaferð«. Hon sigur í tíðindaskrivi, at henni hevur altíð dámað væl at skriva.

Kápumyndina hevur Jónley sjálv gjørt, og yrkingarsavnið er prentað hjá Hestprent.

Í bókhandlunum kostar 40 síður langa savnið 100 krónur.

# Nýggjárið hátíðarhildið í Runavík

NÝGGJÁR
*Ingrid Bjarnastein*

Aftur í ár skipar nýggjársnevndin í Runavíkar Kommunu fyri felags nýggjárshaldi fyri íbúgvunum í kommununi. Byrjað verður klokkan 23.00 við kyndlagongu frá Rókini og inn á nýggja havnarøkið. Nýggjársrøðan verður hildin á miðnátt, og stóra bálið verður tendrað. Harafturat verður skipað fyri felagssangi og fólk fáa høvi til at skjóta sítt egna fýrverkarí. Nevndin heitir á fólk um at brúka trygdarbrillur og stativini, ið verða sett upp til endamálið.

Orkestrið Brak, sum er sett saman av lokalum tónleikarum, sælir til nýggjársdans í høllini klokkan eitt. Ætlanin er eisini at gera eitt sindur burturúr, fyri at fáa høllina so hugnaliga sum møguligt.

# Fylg við Brandi Enni



**Heimasíðan hjá popp-stjørnuni Brandur Enni verður nú javnan dagførd, og gevur hetta møguleika til øll tey, ið ynskja tað at fylgja við tí, sum hendir**

INTERNET
*Ingrid Bjarnastein*

Øllum teimum, ið dámar tónleikin hjá unglinginum Brandur Enni, kunnu nú fylgja við øllum, sum fer at henda í næstu framtíð.

Heimasíðan www.brandurenni.com verður nú javnan dagførd, og til ber at síggja, hvat fer at henda.

Til dømis fer Brandur skjótt til Íslands at syngja saman við Jóhonnu Gúðrun, sum fyri stuttum var í Føroyum, og Waiting in the Moonlight kemur fyrst í næsta ári eisini út sum stakfløga í Danmark.

Skipað verður eisini fyri kappingum, har til ber at vinna eina ferð til Íslands, tá Brandur og Jóhanna Gúðrun skulu syngja. Og eisini er møguleiki fyri at sleppa út at eta við Brandi.

Harumframt er eisini biografi, internethandil og nógv, nógv annað. Ein brævakassi er eisini til tann, ið hevur hug at seta seg í samband við unga tvørámannin.

# Føroysk skúlabørn skulu atkvøða

**Í Álandi hava tey gjørt eina tónleikaverkætlan við 20 unglingum, sum hava gjørt teirra egnu sangir. Nú vilja tey hava føroyskar næmingar at atkvøða um, hvør sangur, sum gjørdur er, er bestur**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Stjórin í Norðurlandahúsinum í Álandi, Stefan Simonsen, sóknast eftir føroyskum skúlanæmingum.

– Eg vil fegin hava samband við nakrar føroyskar skúlaflokkar við næmingum sum eru 13-16 ára gamlir. Vit hava gjørt eina lítla tónleikaverkætlan her í Álandi, har umleið 20 ung hava gjørt teirra egnu sangir við hjálp av einum íslendskum rokktónleikara, sigur Stefan Simonsen.

Sangirnir eru lagdir út á alnetið. Stjórin í álendska norðurlandahúsinum vil fegin hava, at teir næmingar ella flokkar, sum vilja vera við, fara inn á heimasíðuna www.radiotv.aland.fi fram til 22. desember, lurta eftir teimum ymsu sanginum, og atkvøða um, hvønn sangin tey halda er bestur.

# Fimmti ár við Fróðskaparritum

**50. bók av Fróðskaparritum er nú komin. Í ár hevur Føroya Fróðskaparfelag 50 ár á baki, og í sambandi við 50 ára haldið, er eisini 50. bókin av Fróðskaparritum komin**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Fróðskaparrit royna eftir besta førimuni at fylgja við nýggju tíðini, og frá bók nummar 50 kunnu høvundarnir taka serprent teirra niður um alnetið og senda greinarnar runt knøttin. Samstundis er ein gáva frá Føroya Landsbókasavni til Føroya Fróðskaparfelag á 50 ára degnum talgilding av øllum 50 bókunum, og verður arbeiðið ætlandi liðugt summarið 2003.

Fróðskaparrit 1-50 hava verið fíggjað av Mentunargrunni Føroya Løgtings, og hevur Maud Heinesen, skrivari í Føroya Fróðskaparfelag síðani 1963, skrivað søguna aftanfyri og samstarvi við grunnin.

Fróðskaparrit 50. bók er 169 blaðsíður. Haldaragjaldið er 165 krónur um árið. Í leysasølu kostar ritið 195 krónur.



*50. bók av Fróðskaparritum er nú komin*

# Jólacafé í Hæddini

JÓL
*Ingrid Bjarnastein*

Í Hæddini í Runavík lat upp í gjár jólacafé. Henda caféin fer at hava opið fram til 22. desember frá klokkan 16 – 22. Her ber til at keypa sær rís a la mande og holukøkur við einum heitum kaffimunni.

Hvørt kvøld frá klokkan 19 verður livandi tónleikur á skránni. Hóskvøldið undirhalda Søren, Hjalti og aðrir, Fríggjakvøldið Morid, Maria, Joan og fleiri. Leygarkvøldið syngur ein gentubólkur við Duritu, Drós og Ester, og sunnukvøldið verða Søren, Hjalti og hinir aftur at hoyra.

Tað eru Mentanarhúsfelagið og Pensionistafelagi, sum í ár bjóða øllum inn á gólvið til ein heitan kaffimunn og livandi tónleik eftir ein huglaligan innkeypstúr í Handilsmiðdeplinum í Runavík.



# Kasta ljós á grindadráp

**Vit eiga at kortleggja, hvørjar avleiðingar grindadráp hevur fyri føroyskan útflutning. Tað heldur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum. Hann sigur, at trupulleikin bara vindur upp á seg, og at franski marknaðurin nú eisini setir føtur í spenni**

GRINDADRÁP
*Ingi Rasmussen*


*Grindadráp ella útflutningur av lidnum vørum. Vit eiga at gera okkum greitt, hvat samband er millum hesi, heldur stjórin í Vinnuhúsinum.*

Grindadráp er ein kleppur um beinini, tá føroyingar skulu selja og marknaðarføra sínar vørur uttanlands.

Tað ásannar Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum kennir væl til trupulleikarnar, sum vóru ávístir í Sosialinum í gjár.

Stjórin í stóru altjóða fyritøkuni SN Global, Carl á Lag, førdi fram, at føroyingar hava so ringt orð á sær uttanlands, tí vit drepa grind, at tað er nærum ógjørligt at selja stórum handilsketum lidnar føroyskar vørur, so sum laksaportiónir.

Avleiðingin verður, at laksavirkini í Føroyum fáa ikki ment seg, tí fiskurin verður seldur sum rávøra í staðin, og arbeiðspláss fara fyri bakka.

### Vindur upp á seg

Jan Mortensen sigur, at hetta er ein gamal trupulleiki, men hann vindur bara upp á seg. Áður hava tað verið stóru handilsketurnar í Onglandi og Týsklandi, sum hava útihýst føroyingum, men nú er sama rákið komið Fraklands.

– Trupulleikin er, at stórar handilsketur hugsa kalt og kyniskt, og tað skulu tær eisini gera. Kunnu tær fáa somu vøru onkra aðrastaðni uttan vanda fyri at koma í ringt orð, so keypa teir hana heldur har, sigur Jan Mortensen.

### Smá og viðbrekin

Spurningurin er so, um vit eiga at gevast at drepa grind, tá valið stendur millum at selja lidnar fiskavørur uttanlands ella at fáa grindina til høldar.

– Føroyingar vilja drepa grind, men vit eiga at hugsa um tað, og gera okkum greitt, hvat vit eru uppi ímóti. So kunnu vit taka støðu út frá tí, sigur Jan Mortensen.

Politikkurin hevur í mong ár verið at føra prógv fyri, at grindastovnurin ikki er hóttur, og at vísa á, at veiðihátturin er batnaður nógv. Men hetta rínur ikki við stóru handilsketurnar.

– Trupulleikin er, at vit eru so smá og viðbrekin. Tað er stutt síðan, at vit tosaðu við ALDI (týsk handilsketa, blðm.) um hetta. Tey brúka eitt lættkeypt argument, og bíta ikki á mótprógv. Um tey vóru konsekvent, so keyptu tey heldur ikki t.d. spanskt vín, tí spaniólar drepa tarvar til stuttleikar. Munurin er, at vit eru lítil og kunnu verast fyriuttan, sigur Jan Mortensen.

### Leggja kort

Tað eru marknaðarkreftirnar, sum ráða, og tí kunnu vit heldur ikki ráða, hvat onnur skulu gera, er niðurstøðan hjá stjóranum í Vinnuhúsinum. Hann mælir til, at ein kanning verður sett í verk, har ljóskastarin verður settur á grindadráp og avleiðingarnar fyri okkara útflugningsvinnu.

– Spurningurin er, um hetta nakrantíð er kannað ordiliga. Vit hava ongantíð fingið lýst út í æsir, hvørjar avleiðingar tað hevur fyri okkum, at vit halda fast við at drepa grind. Vit eiga at kortleggja trupulleikan, so vit hava eitt felags støði at taka støðu út frá, sigur Jan Mortensen.

# Ginur fingu álitisváttan

**Teir fýra tingmenninir, ið gingu saman um at lækka játtanina til Leikpall Føroya næsta ár, vóru niðurstemmaðir av øllum hinum tingmonnunum. Ginusøgurnar, sum alt rokið stóðst av, fingu sostatt eina dygga álitisváttan**

GINUTING
*Ingi Rasmussen*



Nógv umrøddu Ginusøgurnar hjá Grímu eru farnar sanna sigursgongd um alt landið.

Tær hava fingið eina sjáldsama góða móttøku, tí eini 5.000 fólk hava sæð leikin.

Men tað er ikki øllum, sum dámar leikin, og í løgtinginum hevur móttøkan ikki bara verið góð. Ginusøgurnar vóru í øllum førum ein atvold til, at fýra løgtingsmenn – ein úr Miðflokkinum, ein úr Javnaðarflokkinum og tveir úr Fólkaflokkinum – løgdu uppskot fyri løgtingið um at skerja játtanina til Leikpall Føroya við 400.000 krónum. Landsstýrið hevði annars longu skotið upp, at Leikpallur Føroya skuldi hækka úr 2,8 milliónum krónum upp í 3,2 milliónir krónur komandi ár.

Men uppskotið hjá tingmonnunum, sum vóru Jenis av Rana, Gerhard Lognberg, Jógvan á Lakjuni og Jákupi Mikkelsen, fall so logandi. 28 tingmenn- og kvinnur atkvøddu nei til at skerja Leikpall Føroya, og bara fýra atkvøddu fyri.

Sostatt vóru tað bara teir fýra uppskotstillararnir, sum ræddust ginuávirkanina á føroyska leiklist. Og ginurnar og Leikpallur Føroya fingu eina dygga álitisváttan.

### Óvanlig umrøða

Ginurnar fingu annars sjáldsama nógva umrøðu av tingsins røðarapalli, tá fíggjarlógin fyri 2003 var til triðju og endaligu viðgerð. Mest sum øll, ið tóku orðið í viðgerðini, sum tók tríggjar tímar, høvdu Ginusøgurnar á lofti.

Uppskotstillararnir søgdu ikki so nógv ítøkiligt um innihaldið í leikinum, helst tí teir ikki hava sæð hann. Men tað vóru nøkur, sum høvdu sett seg inn í málið.

Heðin Mortensen spurdi beinleiðis, um uppskotstillararnir yvirhøvur høvdu sæð leikin, men hann fekk onki svar. Sjálvur hevði hann sæð leikin og segði hann vera áhugaverdan við nógvum góðum og sigandi søgum.

Páll á Reynatúgvu segði seg eisini hava sæð leikin, sum hann helt vera einastandi væl leiktan og bæði viðkomandi og upplýsandi fyri øll.

Kaj Leo Johannesen hevur eisini sæð leikin, og segði tær snúgva seg um kvinnulagnur, sum eisini finnast í Føroyum, hóast onkrir tingmenn avnokta hesum.

### Ein orsøk

Umrøðan snúði seg nógv um, hvørt løgtingið skal blanda seg uppí, hvørjir leikir skulu setast upp á Leikpalli Føroya.

Jenis av Rana førdi fram, at hann sjálvur ikki hevði nevnt Ginusøgurnar við einum orði, tá hann skeyt upp at lækka játtanina, men viðgekk í somu vending, at tær vóru ein orsøk til uppskotið.

– Eg vil ikki forða nøkrum í nøkrum. Tey kunnu framleiða, og fólk kunnu hyggja so galið, tey vilja. Vit eiga bara ikki at stuðla slíkum, segði Jenis av Rana.

Men Ginusamgongan fall. Løgtingið helt fast við upprunaliga játtanina, og Leikpallur Føroya varð ikki skerdur av ginuávum.

# Systrar gerast frøðingar

**Føroyar fáa nýggja útbúgving í sjúkraróktarfrøði. Løgtingið hevur samtykt skipa fyri nýggjari útbúgving, sum gevur sjúkraøktarfrøðingum bachelor-heiti. Sjúkrasystraskúlin skiftir navn til Sjúkraróktarfrøði-skúlin**

SJÚKRARØKT
*Ingi Rasmussen*

Sjúkrasystrarnar eru um at fara í søguna, og í staðin fáa vit sjúkrarøktarfrøðingar.

Orsøkin er, at útbúgvingin verður løgd um, so hon samsvarar við tær í okkara grannalondum. Á skúlanum, sum nú eitur Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, fær sjúkrarøktarfrøðingur bachelorheiti í røktarfrøði – Bachelor of Science in Nursing.

Hetta merkir í stuttum, at førleikakrøvini verða økt, og at skúlin fær støðu sum hægri lærustovnur. Sum hægri lærustovnur kann skúlin fáast við vísindaliga gransking í evnum, sum hava við heilsuvísindi at gera.

Mentanarnevndin hjá løgtinginum viðgjørdi uppskotið um nýggju útbúgvingina, og hon gjørdi vart við, at tað var óheppi, at fleiri útbúgvingastøð í Føroyum fáa myndugleika at útvega nýútbúnum bachelor-heiti. Mest natúrligt er, at Fróðskaparsetur Føroya sum granskingarstovnur fær hendan myndugleika, og tí mælti nevndin til, at skipað verður fyri samstarvi millum Sjúkrarøktarfrøðiskúlan og Setrið. Endamálið er at geva Fróðskaparsetur Føroya BS-myndugleika hjá teimum nýútbúnu frá Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum.

Uppskotið er lagt fram og samtykt í løgtinginum, tí skúlamál eru yvirtikin frá Danmark. Nú verður skúlin sostatt skipaður eftir føroyskari lóg, og innihaldið í undirvísingini verður ásett við kunngerð við heimild í lógini.

Innihaldið og krøvini fara at líkjast teimum, sum eru í øðrum Norðurlondum.